INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið

22. september 2006
Mál: 5102-002/06-10
Viðgjørt: HIH

**Løgtingsmál nr. /2006: Uppskot til løgtingslóg um sjálvbodnar kommunusamanleggingar**

**Uppskot**
**til**
**løgtingslóg um sjálvbodnar kommunusamanleggingar**

Øki lógarinnar

**§ 1.** Henda løgtingslóg ásetir treytirnar fyri sjálvbodnum kommunusamanleggingum og eindum, ið sjálvbodnar samanleggingar ella kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur, skulu halda seg innanfyri.

*Sjálvboðin kommunusamanlegging*

**§ 2.** Sjálvbodnar kommunusamanleggingar ella kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur kunnu verða framdar/framd innan hesar eindir:

1) Norðoyggjar t.e. Fugloyar, Svínoyar, Viðareiðis, Hvannasunds, Klaksvíkar, Kunoyar, og Húsa kommunur.
2) Eysturoy, t.e. Fuglafjarðar, Leirvíkar, Gøtu, Nes, Runavíkar og Sjóvar kommunur.
3) Sundalagið, t.e. Eiðis, Funnings og Sunda kommunur.
4) Streymoy, t.e. Vestmanna, Kvívíkar og Tórshavnar kommunur.
5) Vágar, t.e. Sandavágs, Miðvágs og Sørvágs kommunur.
6) Sandoy, t.e. Skopunar, Sands, Skálavíkar, Húsavíkar og Skúvoyar kommunur.
7) Suðuroy, t.e. Hvalbiar, Tvøroyrar, Fámjins, Hovs, Porkeris, Vágs og Sumbiar kommunur

**§ 3.** Avtalur um kommunusamanlegging skulu hava fyrilit fyri:

1) at stovnseta kommunueindir, sum eru samfeldar landafrøðiliga og samferðsluliga,
2) Møguleikunum fyri at menna fólka-, vinnu- og búskaparviðurskifti,
3) at røkja kommunuuppgávur, og
4) at fólkatalið helst skal verða í minsta lagi 2000 borgarar.

Postboks 159 · 110 Tórshavn · Tlf 358080 · faks 358085 · imr@imr.fo · www.imr.fo

*Stk. 2.* Reglurnar í stk. 1, nr. 1 og 4, eru ikki galdandi fyri útoyggjakommunur, ið hava ætlanir um kommunusamanlegging sínámillum.

**§ 4.** Áðrenn avtalur um kommunusamanleggingar verða góðkendar av landsstýrismanninum sambært § 5, skal semja í minsta lagi vera um:

1) kommununavnið, har heitið "kommuna" skal vera ein partur av navninum,
2) staðseting um, hvar og hvussu kommunustýrið finnur sær sæti,
3) mannagongd um samanlegging av fyrisiting,
4) uppgerð av ognar- og fíggjarviðurskiftum,
5) tíðarfesting um, nær samanleggingin skal vera fullførd, og
6) um staðbundnar nevndir skulu verða settar.

*Heimildir*

**§ 5.** Avtalur um sjálvbodnar kommunusamanleggingar skulu góðkennast av landsstýrismanninum.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann, eftir góðkenning frá viðkomandi kommunum, umskipa og tillaga kommunumark, har kommunusamanleggingin ber við sær óhóskilig marknaviðurskifti. Eru ivamál um kommunumark, tekur landsstýrismaðurin avgerð í málinum.
*Stk. 3.* Avgerðir sambært stk. 1 og 2 eru endaligar innan fyrisitingina.

**§ 6.** Uttan mun til, um talan er um kommunusamanlegging, kann landsstýrismaðurin góðkenna eina umskipan av markinum í millum kommunur, um semja er teirra millum.

**§ 7.** Landsstýrismanninum verður heimilað at skipa fyri vegleiðandi fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging eftir ásetingunum í kommunuvallógini.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um vegleiðandi fólkaatkvøðu.

*Gildiskoma*

**§ 8.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 77 frá 8. mai 2001 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar

**§ 9.** Tá henda løgtingslóg kemur í gildi, eru tær føroysku kommunurnar hesar: Fugloyar-, Svínoyar-, Viðareiðis-, Hvannasunds-, Klaksvíkar-, Kunoyar-, Húsa-, Fuglafjarðar-, Leirvíkar-, Gøtu-, Runavíkar-, Nes-, Sjóvar-, Sunda-, Eiðis-, Funnings-, Kvívíkar-, Vestmanna-, Tórshavnar-, Sandavágs-, Miðvágs-, Sørvágs-, Skopunar-, Sands-, Húsavíkar-, Skálavíkar-, Skúvoyar-, Hvalbiar-, Tvøroyrar-, Fámjins-, Hovs-, Porkeris-, Vágs- og Sumbiar kommuna.

**Kap. 1. Almennar viðmerkingar**
Endamálið við hesum lógaruppskoti er at víðka galdandi lóg til eisini at áseta ítøkiligar eindir fyri møguligum/gjørligum kommunalum samstørvum ella kommunusamanleggingum. Hesar eindirnar skulu síðani verða tær einastu eindir, ið kunnu nýtast í viðurskiftum, ið hava við kommunur at gera. Hetta skal eisini vera galdandi, tá talan er um kommunal samstørv við heimild í serlóggávu, ið heimilar kommunum at samstarva um at loysa uppgávur.

Uppskotið verður lagt fram, tí mett verður, at tíðin er komin til eintýtt at áseta, hvørjar tær kommunalu eindirnar skulu vera, annaðhvørt, um tað verður til samstarv ella kommunusamanlegging. Samstundis er tørvur á lógargrundarlagi, ið heimilar landsstýrismanninum at skipa fyri vegleiðandi fólkaatkvøðu um kommunusamanleggingar við støði í tilmæltu kommunalu eindunum.

*Vegleiðandi fólkaatkvøða*
Eftir uppskotinum fær landsstýrismaðurin heimild at skipa fyri vegleiðandi fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging við støði í ítøkiligu tilmælunum um eindir og heimild í kunngerð at áseta nærri reglur og mannagongdir o.s.fr.. Tað eru kommunustýrini, ið hava avgerðarrættin tá tað snýr seg um kommunusamanlegging. Í sambandi við tær flestu samanleggingar, ið eru framdar, hava vegleiðandi fólkaatkvøður verið hildnar, áðrenn kommunustýrini hava samtykt at leggja saman. Við heimildini at skipa fyri vegleiðandi fólkaatkvøðu fær landsstýrismaðurin heimild at fáa staðfest, um undirtøka er fyri at leggja saman í tilmæltu eindirnar. Úrslitini kunnu síðan nýtast sum grundarlag hjá kommunustýrunum at samtykkja at leggja saman ella at leggja seg eftir at samstarva í eindunum, alt eftir um tað snýr seg um meiriluta fyri ella meiriluta ímóti samanlegging.

*Galdandi lóg*
Upprunauppskotið til galdandi lóg um sjálvbodna kommunusamanlegging (tingmál 88/2000) var grundað á, at kommunusamanleggingar skuldu verða sjálvbodnar, tó at tað var mett neyðugt at áseta, hvørjar tær ynskiligu eindirnar vóru, um farið var undir sjálvboðið at leggja saman í størri kommunalar eindir. Eftir at hava viðgjørt uppskotið, mælti rættarnevndin til at strika ítøkiligu ásetingarnar um, hvørjar tær ynskiligu eindirnar skuldu vera, tí hetta var ikki mett neyðugt vísandi til ásetingarnar, sum nú eru § 2 í galdandi lóg.

Síðani lógin um sjálvbodna kommunusamanlegging kom í gildi í 2001, er talið á kommunum minkað úr 48 niður í 34. Allar samanleggingarnar hava hildið seg innan fyri tær í upprunauppskotinum tilmæltu eindirnar. Tað sama er ikki galdandi fyri samstørv millum kommunur, ið eru stovnsett í sambandi við lógarásett samstørv í serlóggávu, hetta kann verða sera óheppið, um talið av skipaðum samstørvum fer at økjast millum kommunurnar, og/ella um fleiri økir verða løgd til kommunurnar, uttan at kommunur leggja saman í størri eindir. Vandi kann verða fyri, at ymsu samstørvini ikki vera samanfellandi, tvs. ymsar kommunur fara at samstarva um ymisk økir, avleiðingin verður, at alt størri partur av kommunala sjálvræði verður lagdur til samstørv at umsita,

samstundis sum samstørvini ofta bara hava fyrilit fyri tí, ið samstarvað verður um og ikki øllum økjum, ið kommunurnar umsita.

**Krøv til eindina**
Hvørji eyðkenni eru, ið hava týdning, tá hugsað verður um møguligar størri eindir. Kommununevndin legði dent á hesi eyðkenni:

A. Landafrøðilig viðurskifti
B. Samferðsluskipan
C. Fólkagrundarlag
D. Samstarv

**A. Landafrøðilig viðurskifti**
Eindin skal vera ein natúrlig landafrøðilig eind, so at ráðleggingin og tænastuveitanin til borgaran loða væl saman. Tað er til dømis óhugsandi, at Sandoyggin og Norðoyggjar verða lagdar saman í eina kommunu ella ásett sum samstarvseind, tí henda eindin loðar ikki saman landafrøðiliga. Víddin og skapið á eindini eigur at vera soleiðis, at íbúgvarnir í eindini hava rímiliga atgongd til miðdepilin og tær almennu tænasturnar, og at gjørligt er at hava eina felags fatan av deplinum. At eindin er ein natúrlig landafrøðilig eind, átti eisini at borið við sær, at íbúgvarnir lættari kunnu venja seg við eindina, um teir ikki frammanundan hava eina kenslu av eindini.
Eitt oyggjasamfelag sum Føroyar er frá náttúrunnar hond býtt sundur í landafrøðiligar eindir. Dømi um eintýddar, landafrøðiligar eindir eru: Vágar, Norðoyggjar, Suðuroy og Sandoy.

**B. Samferðsluskipanin**
Alment kann verða sagt, at samferðslunetið/-skipanin í Føroyum er væl útbygd. Eitt sjálvsagt krav til nýggju eindirnar er, at tær skulu vera ein samanhangandi samferðslu-eind, so at ikki skal verða neyðugt at fara ígjøgnum eina aðra eind fyri at koma til hinar partarnar av eindini.
Í hesum viðfangi eigur eisini at verða havt í huga, at eindirnar mega verða skipaðar á tann hátt, at tær hava fyrilit fyri ferðamynstrinum hjá íbúgvunum við atliti at bústaði og arbeiði, og hvat miðstaðarøki lættast er at koma til hjá borgarunum, bæði í almennum og privatum ørindum teirra. Um eindirnar hava hetta í huga, so stimbrar tað hitt staðbundna fyritakssemið, tí tænastuframleiðslan kann verða lagað til búset-ingarmynstrið, lendisskipanin kann verða samskipað betur, og eitt betri samsvar fæst millum tey, sum nýta tænasturnar, og tey, sum fíggja tær.

**C. Fólkagrundarlag**
Hvussu stór ein eind í minsta lagi eigur at vera, er treytað av, hvørjar uppgávur kommunurnar skulu loysa. Umframt eina sømiliga fyrisiting skal eindin eisini kunna bjóða sínum borgarum tær tænastur, sum ein borgari í einum nútíðar samfelagi krevur; og krøvini verða størri og størri. Um so er, at eindin ikki megnar hetta, ja, so leitar borgarin sær aðrar leiðir eftir hesum tænastum. Ein eind eigur m.a. at bjóða sínum íbúgvum: skúlagongd, eina sosiala skipan, ellis- og røktarheim, ítróttar- og samkomuhús o.s.fr.
Við støði í hesum áskoðanum metti Kommununevndin, tá hon viðgjørdi spurningin um kommunueindir, sum skilabest, at fólkatalið í kommunueindini ikki skuldi vera minni

enn 2.000, og at best hevði verið, um tað var enn størri. Nevndin helt tað tó vera óveruligt at seta markið hægri enn 2.000, av tí at tær landafrøðiligu umstøðurnar í Føroyum eru so háttaðar, sum tær eru. Markið við 2.000 íbúgvar var eisini grundað á, at tað var tað, ið nevndin metti kravdist, fyri at kommunurnar kundu átaka sær fólkaskúlan sum eina kommunala uppgávu burturav. Við einum fólkagrundarlagi, sum er á leið 2.000 íbúgvar, hevði ein kommuna næmingagrundarlag fyri einum 2-sporaðum fólkaskúla. Hetta metti nevndin bar við sær ein virknari rakstur bæði hølisliga og undirvísingarliga, eins og tey fakligu tilboðini til næmingarnar vóru størri.

**D. Samstarv**

Kommununevndin metti eisini, at fyrilit átti at verða fyri kommunusamstarvi (kommunusamstørvum) av ymiskum slagi, av tí at samstørv hava skapt eina meira ella minni samanhangandi eind og eina felags kenslu.

Bestu hóskandi kommunueindir

Við støði í teimum nevndu eyðkennum verður mælt til hetta eindarbýtið:

- Norðoyggjar
- Eysturoy
- Sundalagið
- Streymoy
- Vágar
- Sandoy
- Suðuroy

Eindirnar: Norðoyggjar, Vágar, Sandoy og Suðuroy eru serliga grundaðar á eyðkenni sum natúrligar, landafrøðiligar eindir.

Mælt verður til, at Suðuroyggin verður ein eind, sjálvt um oyggin við 2 eindum lýkur áður nevndu krøv. Men av tí at øll oyggin er ein natúrlig, landafrøðilig eind, verður hon nógv sterkari, um hon er ein, tí serstakliga tann fíggjarliga orkan verður størri. Eisini kann hugsast at tað verður ein óhepni innanhýsis kapping, um tað verða 2 eindir í Suðuroynni heldur enn ein felags oyggjarmenning.

Við samstarvið og samanleggingum í Sundalagnum er longu eitt slag av felagskenslu, og síðan brúgvin varð bygd um Streymin, hevur hetta økið verið ein samanhangandi samferðslueind. Av hesum ávum, og at Kollafjørður er partur av Tórshavnar kommunu, verða Streymoyggin og Eysturoyggin býttar eitt sindur øðrvísi enn t.d. sýslubýtið og valdømisbýtið er í dag.

**E. Norðoyggjar**

Eindin fevnir um: Fugloyar, Svínoyar, Viðareiðis, Hvannasunds, Klaksvíkar, Kunoyar og Húsa kommunur.

Norðoyggjarnar eru ein natúrlig, landafrøðilig eind. Miðstaðarøkið í hesum føri er Klaksvík. Ferðasambandið úr oyggjum og bygdum er til Klaksvíkar bæði viðvíkjandi arbeiði, almennum tænastum og samskiftinum haðani og úr Norðoyggjunum. Tó hava fólk í Fugloy og Svínoy ikki somu atgongd til tænasturnar.

Umframt hesi viðurskifti hava Norðoyggjar ymisk samstørv. Tær eru eitt læknadømi, allar kommunurnar í Norðoyggjum eru í Norðoya sýslu, og til løgtingsval eru Norðoyggjar eisini eitt valdømi. Av søguligum samstørvum er greitt, at Norðoyggjar vóru ein

kommuna, tá ið kommunala skipanin varð sett í verk í 1872. Harumframt samstarva Norðoyggjar eisini um ellisheim og um ferðavinnuna.

**F. Eysturoy**
Eindin fevnir um: Fuglafjarðar, Leirvíkar, Gøtu, Nes, Runavíkar og Sjóvar kommunur.
Hetta er ein natúrlig, landafrøðilig eind og samanhangandi samferðslueind.
Um samstørvini í hesi eindini er annars at siga, at samstarvað hevur verið ymsar vegir, og bendir tað ikki á eina so eintýdda eind. T.d. eru í Eysturoynni 3 læknadømi: Nes sóknar læknadømi, sum er Nes og Runavíkar kommunur. Kommunurnar kring Skálafjørðin (t.e. eisini Gøtu kommuna) samstarva um Kongshavnar havn og um brunamál (tó ikki Gøtu kommuna). Nes og Runavíkar kommunur samstarva um musikkskúla. Fuglafjarðar, Leirvíkar og Gøtu kommunur samstarva um brunamál og ítróttahøllina á Kambsdali. Harumframt keypa Leirvíkar og Gøtu kommunur sær framhaldsskúlapláss í Fuglafirði.
Bæði tí møguleikin er at stovnseta eina stóra eind, og at við eini loysn við tveimum minni eindum hevði verið neyðugt at býtt Gøtu kommunu í tvey, verður mælt til, at Eysturoy verður ein eind.

**G. Sundalagið**
Eindin Sundalagið fevnir um: Eiðis, Sunda og Funnings kommunur.
Hetta er ikki beinleiðis ein natúrlig, landafrøðilig eind; men brúgvin um Streymin ger hesa eindina til eina samanhangandi samferðslueind.
Eindin verður ein av teimum minstu, men hetta økið hevur lutfalsliga góðar menningarmøguleikar. Í økinum er longu farin fram stór samanlegging, samstundis sumt tað er nógv samstarv millum kommunurnar.

**H. Streymoy**
Eindin fevnir um: Vestmanna, Kvívíkar og Tórshavnar kommunur.
Tórshavnar, Kvívíkar og Vestmanna kommunur eru ein sjálvstøðug, landafrøðilig eind. Hetta er náttúrligt, tí vanliga samskiftið er við miðstaðarøkið. Í hesum viðfangi er at nevna, at av tí at Kollafjarðar og Tórshavnar kommunur vóru lagdar saman, kunnu Kvívíkar og Vestmanna kommunur ikki lúka tey eyðkenni, ið áður eru nevnd, at vera sjálvstøðug eind, og tær verða tí natúrligur partur av økinum. Mesta samskiftið hjá hesum kommunum er við Tórshavn, samstundis sum samskifti vestur í Vágar ikki kann metast at verða grundarlag fyri eini samstarvseind, tí ein náttúrligur miðdepil hjá hesum kommunum heldur liggur í Tórshavn enn í Vágum.

**I. Vágar**
Endin fevnir um: Sandavágs, Miðvágs og Sørvágs kommunur.
Vágar er ein natúrlig, landafrøðilig eind. Umframt Vágoy er Mykines eisini partur av hesi eind, tí alt samskifti við Mykines fer um Vágarnar.
Samferðslan í oynni er góð. Tí er góður møguleiki hjá íbúgvunum í oynni at ferðast til arbeiðis og at fáa atgongd til privatar og almennar tænastur. Mykinesfólk hava harafturímóti ikki so lætta atgongd til tænasturnar.
Tað eru ymisk samstørv millum kommunurnar í økinum. Fyrst er at nevna Felagskommununa í Vágum. Vágar eru eisini: eitt læknadømi, ein sýsla, eitt valdømi til løgtingsval, og upprunaliga vóru tær eisini ein kommuna. Harumframt samstarva kommunurnar um ellisheimið í Vágunum og eisini um musikkskúlan

**J. Sandoy**
Eindin fevnir um: Skopunar, Sands, Skálavíkar, Húsavíkar og Skúvoyar kommunur.
Sandoyggin er ein natúrlig, landafrøðilig eind. Umframt Sandoynna er Skúvoy eisini partur av hesi eind, tí tað mesta av samskiftinum úr Skúvoynni er um Sandoynna, og tí at Skúvoy landafrøðiliga og natúrliga hoyrir til Sandoynna.
Fólkatalið er undir 2.000, sum mett varð at vera skilabesta markið, tó er nógv sum talar fyri, at tað er best at liva við einum undantaki í hesum føri, tí tað mundi verið ónatúrligt og óhóskandi at lagt hesa eindina saman við t.d. Suðuroynni, Vágum ella Streymoy. Henda eindin kann gerast lutvíst tyngri at reka. Hugsast kann tó, at hendan eindin, í størri mun enn hinar stóru, keypir sær tænastu frá øðrum, heldur enn sjálv at uppbyggja allan neyðugan serkunnleika. Eindin skuldi tí ikki verið nøkur forðing fyri at lagt uppgávur út til kommunurnar. Hædd eigur tó at verða tikið fyri hesari eindini í kommunuskipanini.
Samferðsluskipanin í Sandoynni er góð, og tí er lætt hjá íbúgvunum at ferðast í oynni bæði í sambandi við arbeiði, og tá ið tørvur er á privatum og almennum tænastum.
Skúvoyingar hava harafturímóti ikki so lætta atgongd til tænasturnar.
Sandoyggin saman við Skúvoy eru ein sýsla, eitt valdømi til løgtingsval, eitt læknadømi, og henda sýslan var ein av teimum upprunaligu kommununum. Harumframt samstarva kommunurnar í Sandoynni á fleiri økjum.

**K. Suðuroy**
Eindin fevnir um: Hvalbiar, Tvøroyrar, Fámjins, Hovs, Porkeris, Vágs og Sumbiar kommunur.
Øll Suðuroyggin er ein natúrlig, landafrøðilig eind. Suðuroyggin hevur ymisk samstørv: hon er ein sýsla (hevur fyrr verið tvær), eitt valdømi til løgtingsval, og hon var ein av teimum upprunaligu kommununum í 1892. Harumframt verður samstarvað á fleiri økjum sum ein eind; tað eru tó eisini samstørv, ið ikki fevna um alla oynna. Suðuroyar norðara helvt er eitt læknadømi. Harafturat samstarva hesar kommunur um barnatannlæknan, og Hvalbiar og Tvøroyrar kommunur samstarva um brunamál. Hvalbiar og Fámjins kommunur keypa sær eisini framhaldsskúlapláss á Tvøroyri.
Suðuroyar sunnara helvt er eitt læknadømi. Harafturat samstarva hesar kommunur um barnatannlæknan, og Sumbiar, Vágs og Porkeris kommunur samstarva um brunamál. Hovs, Porkeris og Sumbiar kommunur keypa sær framhaldsskúlapláss í Vági.
Tilmælið er tó ein samanleggingar- ella samstarvseind. Tíðin er farin frá møguleikanum fyri tveimum eindum, og vandi kann eisini verða fyri einari óhepnari kapping, har tilfeingið ikki verður nýtt á besta hátt.

**L. Hoyring**
Uppskotið skal til hoyringar hjá øllum kommununum umframt, Føroya Kommunufelag og Kommunusamskipan Føroya.

**Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum**
Ongar beinleiðis fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar standast av uppskotinum, hvørki fyri land ella kommunur. Orsøkin til hetta er, at uppskotið einans ásetir karmar fyri sjálvbodnum kommunusamanleggingum og tær eindir, ið samanleggingar ella samstørv ísv. lógarbundnar uppgávur skulu halda seg innanfyri.

Skipar landsstýrismanninum fyri vegleiðandi fólkaatkvøðu, verður kostnaðurin av eini tílíkari fólkaatkvøðu ein til hálva aðru millión kr.

Uppskotið fær ongar avleiðingar fyri vinnuna ella umhvørvið.

Ongar serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar verða fyri serstøk øki í landinum orsakað av uppskotinum, heldur ikki fær tað sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

Eingir millumtjóðasáttmálar, ið binda Føroyar, eru á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um.

Hóast viðmerkingarnar omanfyri m.a. siga, at ongar sosialar avleiðingar verða fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir av uppskotinum, skal viðmerkjast, at ein avleiðing, sum verður, er, at ein ávís avmarking sjálvsagt verður viðvíkjandi hvørjum kommunum, ein kommuna kann samstarva ella leggja saman við.

Harumframt er vert at leggja til merkis, at uppskotið eftirfylgjandi kann fáa avleiðingar, um sjálvbodnar samanleggingar verða framdar sambært hesum lógaruppskotinum. Ein tílík samanlegging skuldi givið samanløgdum kommunum størri umsitingarførleika og møguleika fyri við skynsamari rakstri at minka um rakstrarútreiðslurnar. Hesar samstarvs- ella samanleggingareindir kunnu eisini hava umsitingarligar avleiðingar bæði fyri land og kommunur, við tað at tað verða meiri ítøkiligar eindir at fyrihalda seg til, tá spurningurin um at fáa eitt greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur skal viðgerast frameftir.

| | Fyri landið/lands-myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | (Nei) | |

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**
Her verður mælt til, at lógin umframt at áseta treytirnar fyri sjálvbodnum kommunusmanleggingum, eisini skal fevna um samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur.

**Til § 2**
Her verða 7 ítøkiligar samstarvs- ella samanleggingareindir ásettar.

**Til §§ 3 - 6**
Hesar ásctingar eru óbroyttar frá §§ 2-5 í galdandi lóg.

**Til § 7**
Um vegleiðandi fólkaatkvøða verður fyriskipað av landsstýrismanninum, skal hon taka støðu í tilmæltu eindunum í § 2. Ein tílík fólkaatkvøða verður framd eftir ásetingunum í kommunuvallógini. Landsstýrismaðurin fær heimild í kunngerð at áseta nærri reglur m.a. um atkvøðuseðlar, brævatkvøður og tíðarásetingar .

**Til § 8**
Ongin viðmerking

**Til § 9**
Dagført yvirlit yvir kommunurnar .